# mleiðslu í ár

# Stór vitan hjá føroyingum

## - Vit vilja fegnir brúka vitan okkara í eini føroyskari oljuvinnu, sigur skálamaðurin Hans Jákup Johannesen.

**OLJUVINNA**
*Snorri Brend*

Hans Jákup hevur verið heima á Skála í eina tíð, og skal avstað aftur til Melkøya í hesi vikuni.

Hann er vitandi um, at talið av arbeiðsdøgum hjá føroyingunum á oynni fer so líðandi at fækka.

Møguleikarnir hjá føroyingum at fáa arbeiði í Noregi eru framvegis til staðar, - ja, í roynd og veru góðir!

- Vit sum hava arbeitt her, hava upparbeitt okkum eina stóra og víttfevnda vitan um arbeiðið á slíkum anleggum.

- Hesa vitanina vilja vit fegnir brúka aftur á øðrum støðum – eisini her á landi einaferð í framtíðini, sigur Hans Jákup.

### Ikki missa fólkini

Sjálvur hevur hann kannað møguleikarnar fyri at kunna útvega sær og øðrum víðari arbeiði á norskari jørð.

So seint sum í farnu viku tosaði hann við eina norska fyritøku um arbeiði.

Henda fyritøkan hevði hoyrt um føroyingar og visti um teirra kunnleika og arbeiðsevnir. Hon var tí áhugað í at fáa fleiri føroyingar í arbeiði.

Henda fyritøkan hevði eina skipan, har arbeiðsfólkið arbeiddi í 12 dagar og vóru síðani 16 dagar heima.

Hagani vóru boðini bæði einføld og greið: - Send okkum bara eina umsókn, so finna vit út av tí!

Hans Jákup er tí sannførdur um, at neyðugt er at halda hesa vitanina viðlíka. Og møguleikarnir til tað eru veruliga til staðar, inntil ein føroysk oljuvinna tekur seg upp.

- Vit mugu ikki missa øll hesi fólkini. Tey mugu sleppa at halda fram í vinnuni, tí tað eru tey sum hava og fáa royndirnar á økinum.

- Tá vit so fara undir oljuvinnuna ein dag, - ja, so hava vit eisini hesi fólkini, sigur hann.



*- Vit sum hava arbeitt her hava upparbeitt okkum eina stóra vitan um arbeiðið á slíkum anleggum, sigur Hans Jákup Johannesen Mynd: Jens Kr. Vang*



*2 mió metrar av káplum eru lagdir runt á Melkøya*



*Melkøya hevur heimsins mest framkomna anlegg til móttøku av gassi*

arbeiðum á Melkøya.

Arbeitt hevur vanliga verið í skiftum, har teir eru 14 dagar til arbeiðis á oynni og 21 dagar heima. Um ársskiftið vóru íalt 1380 mans á oynni, og koma teir úr íalt 40 tjóðum.

Ta fyrstu tíðina vóru einir 20 føroyingar til arbeiðis her, men síðani hevur talið verið eitt sindur skiftandi. Í løtuni eru teir 60.

Alt bendir tó á, at hetta talið fer skjótt aftur fer at minka niður í nærum einki, tí nú fer at líða rættiliga væl við føroyska partinum innan tað elektriska arbeiðið.

### Gass til Amerika

Føroysku eletrikararnir hava hesa tíðina verið við í tí spennandi arbeiðinum at umskapa og útbyggja eina lítla oyggj út fyri norska býnum Hammerfest í Norðurnoregi.

Frá at hava verið ein lítil og óbygd oyggj tey seinnu árini, er Melkøya í dag vorðin til mest útviklaða móttøkustaðið og reinsianleggið fyri gass úr Snøhvit-feltinum.

Hetta arbeiðið er so umfatandi og stórsligið, at illa ber til at lýsa við orðum, men myndirnar vísa best gongdina í hesi menningini.

Av oynni verður gassið, sum her verður gjørt til flótandi natúrgass, ført til lond í Suðureuropa og Amerika við sergjørdum tangabátum.

Ein er nú so smátt farin at royndarkoyra ta umfatandi útgerðina á Melkøya, áðrenn tann veruliga framleiðslan úr gassinum fer at byrja seinni í ár.

Tangabátar koma við jøvnum millumbilum við gassi, men seinni skal so framleiðslan á oynni byggja á tað náttúruríkidømið sum finst á Snøhvit-feltinum

- Tá verður talan um vanligt viðlíkahald, og tá er ikki so nógv brúk fyri okkara fólki, greiðir Hans Jákup frá.

> **Okkara vitan vilja vit fegnir brúka aftur á øðrum støðum – eisini her á landi einaferð í framtíðini**

### Menningin av Melkøya frá eini óbygdari oyggj til eitt nútíðar gassanlegg











